# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnars son
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800

*Bilradio á Rás2 verður sent hósdagin kl. 16, og endursent fríggjadag millum kl. 8 og 9, og leygardag kl. 13*

# Ford Mustang Shelby við 500 hk

P/F Wenzel selur ikki bara evropeiskar Fordar í Føroyum. Seinastu árini eru eisini fleiri amerikanskir Fordar komnir til landið sum t.d. Ford Escape, Expedition og Mustang.

Í síðstu viku fingu teir ein heilt serligan bil, ein Ford Mustang Shelby við 500 hk V8 motori.Bilurin er reyður við hvítum strípum. Strípurnar eru eitt sereyðkenni fyri Shelby útgávurnar.

Tað var amerikanarin Carroll Shelby, sum í dag er yvir 80 ára gamal, sum í 1966 byrjaði at gera ráar og frekar útgávur av Mustang við stórum motorum.




*Ford Mustang Shelby tekur seg væl út og er ein heilt serlig uppliving. Á myndini eru f.v.: Jógvan Højgaard, stjóri hjá P/F Wenzel, saman við sølumonnunum Lennard Pedersen og Petur Petersen*

# Opel Insignia avloysir Vectra

**Opel vísa nú fyrstu myndirnar av nýggja Insignia, sum hevur heimspremieru sum sedan og hatchback á London Motor Show í juli 2008**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í heyst kemur ein nýggjum Opel Insignia á marknaðin, sum fer at avloysa núverandi Opel Vectra. Insignia verður ein framkomin bilur við nýggjastu motortøknini, aktivari trygd og umhvørvisvernd. Talan er um ein bil, sum verður bygdur í Týsklandi á Opel verksmiðjuni í Rüsselsheim, sum er ein av mest modernaðu og framkomnu bilverksmiðjum í heiminum.

Insignia er 4,83 m langur og er sostatt umleið 20 cm longri enn tann núverandi Vectra. Insignia kann fáast við nýggjastu AFL (Adaptive Forward Lighting) lyktum, sum fylga vegnum tá bilurin snarar, umframt at hann eisini fæst við LED-koyriljósum.

Fleiri bensin- og dieselmotorar vera at velja í millum: Bensinútgávurnar byrja við 1,6 litra við 115 hk og tann størsti verður ein V6 við 260 hk. Tríggir dieselmotorar frá 110 hk til 160 hk við beinleiðis innspræning Insignia kemur eisini í eini ecoFLEX útgávu við sera lágum $CO_2$ útláti.

Tá Insignia, sum verður drivin av forhjólunum, kemur á marknaðin í heyst, verður hann eisini at fáa í einari 4-hjólsdrivnari útgávu "Adaptive 4X4".

